ítróttur

Nr. 12 • leygardagur • 18. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 19.01 | 14.30 | Kyndil-Neistin |
| 19.01 | 14.30 | StÍF-VÍF |
| 19.01 | 15.00 | VB-Tjaldur |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 19.01 | 13.00 | ÍF-Dráttur |
| 19.01 | 13.00 | Mjølnir-TB |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 19.01 | 15.00 | Fram-Fleyr |
| 19.01 | 15.00 | ÍF-SÍ |

# Seinasta ferðin



*Sveinur Justinussen tóktist hóskvøldið vera største ivamálið í føroyska hópinum, og væntandi varð støða ikki tikin fyrr enn fríggjamorgunin, hvørt hann skuldi við liðnum ella ikki*

*Sveinur Justinussen tóktist hóskvøldið vera største ivamálið í føroyska hópinum, og væntandi varð støða ikki tikin fyrr enn fríggjamorgunin, hvørt hann skuldi við liðnum ella ikki*

**Eingin nýggjur leikari var við á føroyska hondbóltslandsliðnum, sum fríggjadagin legði leiðina til Belgia**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk*

Leygardagin skal føroyska A-landsliðið í manshondbólti spæla sín seinasta dyst í inniverandi EM-undankapping. Seinasti, tí tað er so eingin møguleiki fyri, at liðið vinnur seg víðari úr kappingini, men hinvegin tykist tað vera ein grundað vón um, at føroyingar ikki enda á niðasta sessinum í bólkinum.

Dysturin á heimavølli móti Belgia prógvaði í øllum førum, at føroyska liðið einki hevur at ræðast, men hinvegin skal eingin rokna við, at føroyingarnir fáa nakran lættan dyst í Belgia. Til dystin her mangladu mótstøðumenninir Christophe Bourlet, sum við sínum 53 dystum er ein av royndastu leikarum á liðnum. Hetta tí hann noyddist at venda við á ferðini, tá konan skuldi eiga.

### Fleiri ivamál

Meira týdningarmikið er kanska, at fleiri ivamál er um okkara egnu leikarar. Tá vit hóskvøldið royndu at frætta, hvussu støðan var í hópinum, var framvegis stórur ivi um Áka Olsen og Svein Justinussen. Áki stríðist við ein skaða í lærkrikanum, men roknað varð tó við, at hann verður við í ferðalagnum, tó at tað er meira ivasamt, um hann fer tikið lut í dystinum. Sveinur hevur ligið sjúkur við krími alla vikuna, og seint hóskvøldið var framvegis ikki tikin støða til, hvørt hann fór at verða partur av hópinum. Og undir øllum umstøðum kann roknast við, at hann ikki verður so væl fyri, sum hann undir vanligum umstøðum er, um hann var við í flogfarinum.

Hinvegin tykist Mortan Hansen vera komin heilt fyri seg, eftir at hann annars hevði verið sjúkur undan dystinum móti Belgia. Hóast hann var við í hópinum til tann dystin, so var sjónligt, at hann ikki var 100%, og tí var spælitíðin ógvuliga avmarkað. Og so tykist tað mest sum sannlíkt, at Ingi Olsen eisini verður partur av hópinum.

### Fáa tað besta fram

Í aðrar mátar tóktist lagið á manningini tó at vera gott. Tó at tað kundi verið talan um trý stig í fyrra dystinum móti Belgia, so ásanna teir kortini, at tað eisini kundi koppað hinvegin, og kanska fram um alt, so sýndu leikararnir, at teir stóðu saman undir trýsti. Nú er tað tó Belgia, sum hevur fyrimunin av heimavølli, og tí verur stríðshugurin kanska betri, men alt í alt, so skuldu útlitini fyri einum spennandi dysti tó verið á eini heilt góðari leið.

Skal talan gerast um føroyskan sigur, so er tað tó enn einaferð neyðugt hjá hvørjum einstøkum leikarar at toga tað allarbesta í sær sjálvum fram, og so verður eisini neyðugt at finna aðrar skothóttanir enn Heina Joensen fram. Mett eftir fyrra dystinum man lítil ivi vera um, at mótstøðumenninir frá fyrsta bríksli fara at hava eitt vakið eyga við honum. Nakað sum kanska kann geva øðrum betri pláss. Eitt nú Halgiri Dahl Olesen, sum avgjørt eigur at vera gott boð upp á sessin á vinstra bakki, tó at hann ikki hevði ein av sínum bestu døgum seinast. Hvussu er og ikki, so skal stríðshamurin tó finnast fram eina ferð enn, og at leikararnir megna hetta, hava teir so í øllum førum prógvað einaferð.



# Lokaluppgerðin sær mest spennandi út

**Á pappírinum átti Kyndil at verið besta liðið í Havnini, men hagtølini tala so dundrandi ímóti teimum**

KVINNUHONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Tríggir dystir skulu leikast í bestu kvinnudeildini í hondbólti. Tveir av hesum tykjast á pappírinum at vera dystir, har tey bæði oddaliðini hava møguleikan at økja um frástøðuna til næstu liðini, og so verður talan eisini um grannauppgerð í Havn.

### Oddurin er um at fara

Tá VÍF í grundspælinum hevði sína ringastu løtu í nærum trý ár, var byrjanin til hetta helst dysturin á Skála, har VÍF púrasta óvæntað mátti taka til takkar við einum tapi. Samstundis var hetta byrjanin til ein langan upptúr hjá StÍF, sum eitt skifti førdi tær upp á silvurplássið, men síðani eru tingini kortini blivin meira normaliserað aftur. VÍF tykist nevnliga veruliga hava fingið ferð á seinastu nógvu vikurnar, og tí er einki at ivast í, at tær eru stórfavorittar, tá tær fara inn á Skála sunnudagin.

Hinvegin, so hevur árið víst, at tað ikki gongst soleiðis, sum fólk flest rokna við. Umframt at tær í heyst høvdu eina langa góða periodu, so hevur StÍF eisini av og á tikið oddaliðini á bóli, og tað er einki at ivast í, at tað aftur verður tað, sum farið verður eftir.

Í Vági tykist favorittleikluturin meira greiður, tó at Tjaldur nú fekk nakað av gongd á við sigrinum á Neistanum. VB tykist nevnliga hava fótað sær aftur, eftir at tær annars misti største partin av trivaligu leiðslunil, sum tær høvdu eitt skifti. Munurin til VÍF er heldur ikki meira enn eittans stig í løtuni, og tí eru ráðini als ikki til at missa nakað sum helst, so leingi sum VÍF heldur á fram við at vinna sínar dystir, og tí kann Tjaldur rokna við, at uppgávan verður meira enn trupul.

### Spennandi grannauppgerð

Seinasti dysturin í kvinnudeildini verður í Havn, har grannauppgerð verður millum Kyndil og Neistan. Skal metast eftir seinastu dystunum, so er einki at ivast í, at Kyndil er greiður favorittur. Ikki endiliga tí Kyndil hevur spælt so fantastiska væl seinastu tíðina, men tað tykist onkursvegna, sum um eitt sindur meira av stabiliteti er komið á liðið í seinastuni. Og so hevur tað eisini gingið av skriðjuni hjá Neistanum seinastu nógvu dystirnar.

Verður sæð burtur frá sigrinum á júst Kyndli tann 15. desember, so skal leitast aftur til 13. novemb-er fyri at finna seinasta sigurin, og tá tær seinasta vikuskifti taptu fyri Tjaldri, mundi tað vera eitt søguligt lágmark hjá bláa kvinnuliðnum í høvuðsstaðnum.

Ein grannauppgerð kann tó ikki sammetast við nakað annað, og í júst hesum førinum hevur Neistin seinnu árini havt eina greiða sálarliga yvirvág. Eina yvirvág, sum fleiri ferðir hevur givið úrslit í høpisleysum kyndils-avrikum í grannauppgerðunum, meðan Neistin hinvegin hava spælt við ovurstórum sjálvsáliti. Skal hendan ringrásin brótast, man júst verandi støðan vera ein hin best hugsandi hjá Kyndli, sum í so fall av álvara kann seta kós móti heiðursmerkjum. Hjá Neistanum er hinvegin botnurin og stríðið at koma úr hesum, sum tað snýr seg um. Og móti júst Kyndli síggja tær helst sín besta møguleika at leggja sjógv niður til Tjaldur.



*Seinnu árini hevur Neistin havt eitt sera gott tak á grannunum, men skal Kyndil venda hesum, er løtan nú helst hin rætta*

# Nú skulu sørvingar roynast

**Sørvingar hava júst vunnið seg upp á annað plássið, men fyri framman stendur torførasta avbjóðingin av teimum øllum. Ein dystur, sum samstundis er undanframførsla av steypafinaluni**

MANSFLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Skal metast eftir stigatalvuni, so verður tað ikki long tíð, sum sørvingar í fyrstu atløgu fáa á silvurplássinum. Eftir at tað hevur gingið sum eftir ánni seinastu dystirnar, har teir millum annað hava tikið klaksvíkingar fullkomuliga á bóli, eru sannlíkindi fyri einum sigri í øllum førum lítil sunnudagin.

Mótstøðuliðið er nevnliga ÍF, og tá talan eisini er um dyst á útivølli, skuldi næstan verið óneyðugt at sagt meira. Tað er ein staðfesting, at fuglfirðingarnir higartil í ár hava mest sum einaráðandi, og enn hevur liðið mest sum ikki sýnt tekin um veikleikar. Heldur ikki hóast týdningarmiklir leikarar til tíðar hava mangla, so uppgávan hjá sørvingum er alt annað enn løtt.

Hinvegin er einki at dylja yvir, at skal SÍ taka ÍF, so er rætta løtan júst nú. Sørvingarnir hava í seinastu dystunum sýnt sera gott spæl, har teir í stóran mun hava megnað at trýst mótstøðuliðini. Nakað sum ÍF í dekan ov lítlan mun hevur roynt í ár, og sum júst tí helst eru einastu hyggjuráðini móti oddaliðnum. Hetta, so teir kunnu koma í eina óvanda støðu.



*Tá sørvingar vitjaðu á Kambsdali tíðliga í heyst, var eingin ivi, men hóast trupla uppgávu, so hava seinatu dystirnir víst, at SÍ hevur okkurt at halda vónunum fast í*

Umframt at vera oddadystur, so er her eisini talan um eitt slag av styrkisroynd undan steypafinaluni, sum verður júst millum hesi bæði liðini, og sum eisini er ein endurtøka av finaludystinum frá seinasta kappingarári. Ta ferðina gjørdist tað SÍ, sum vann dystin, men í skrivandi løtu mugu fuglfirðingarnir vera favorittar at vinna finaluna.

Hvørt teir eisini eru tað, tá steypafinalan skal spælast, veldst millum annað um, hvussu tað fer at tørna út nú sunnudagin.

### Klassikari uttan bit

Hin dysturin í bestu mansdeildini um vikuskiftið verður í Havn, har Fleyr og Fram hittast. Lokaluppgerðir plaga vanliga at vera spennandi kostur, og soleiðis var eisini í mong ár við hesum dystinum. So seint sum í fjør stóð gullstríðið - sum Fram vann – júst ímillum hesi bæði liðini, men fyribils er hetta tó bert søga.

Fleyr hevur eitt at kalla spildurnýtt lið, har ungir og óroyndir leikarar skulu venjast við flogbólts á hægsta føroyska støði, og slíkt tekur sína tíð. At stigatalvan eisini boðar frá, at enn hevur Fleyr einki sett vunnið, sigur helst stóran part av søguni í so máta.